# Byrja at skriva fyri lívið í dag

**Frá í dag av kunnu øll fólk kring allan heim verða við til at gera teirra ávirkan inn á lagnuna hjá teimum mongu fólkunum, sum líða undir væntandi mannarættindum**



*Í dag byrjar Amnesty átakið Skriva fyri Lívið, har fólk kring allan heim kunnu gera teirra ávirkan inn á lagnuna hjá samvitskufangum*

MANNARÆTTINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Í dag setur Amnesty International hol á Skriva fyri Lívið átakið, sum er eitt heimsumfatandi átak. Tað gongur í stuttum út uppá, at øll fólk óansæð hvar tey eru, kunnu skriva eitt bræv til ein stjórnarleiðara, har tey heita á hann um at taka málið upp hjá einum ávísum persóni, sum er fyri órættvísi, náða einum deyðadømdum ella líknandi.

Hetta kann gerast við at fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty og velja eitt av teimum trimum brøvunum, sum tey hava skrivað.

Hetta arbeiðið hevur verið í nógv ár nú, og tað hevur víst seg at gera mun.

Í fjør vóru yvir 2.000 samvitskufangar leyslatnir orsakað av brøvum, sum vórðu send út ígjøgnum Skriva fyri lívi átakið.

Átakið er skipað soleiðis, at Amnesty velur hvønn mánað út trý ymisk fólk, sum eru fyri órættvísi á ein ella annan hátt. Síðani skriva tey eitt bræv fyri hvønn og leggja tey út á heimasíðuna. Síðani kunnu fólk, sum ynskja at skriva, prenta brævið út, seta teirra navn undir, leggja tað í ein brævbjálva og senda tað til rætta viðkomandi. Á heimasíðuni stendur sjálvandi bústaðurin hjá viðkomandi. Lættari og einfaldari fær tað illa verið. Amnesty leggur dent á, at her ikki er talan um nakra peningainnsavnan. Hetta er eitt átak fyri at hjálpa neyðstøddum úti í heimi, sum eru fyri órættvísari viðferð.

### Fimm minuttir

Forkvinnan í Amnesty í Føroyum, Annika Sølvará, sigur, at tey fara at heita á arbeiðspláss, virkir og stovnar í landinum um at lata starvsfólk teirra nýta fimm minuttir ein dag um mánaðin til at skriva eitt tílíkt bræv.

– Tað tekur bara fimm minuttir, og tað kann bjarga mannalívum, sigur hon.

Annika greiðir frá, at hetta hevur alstóran týdning, og undirtøkan í Føroyum undanfarin ár hevur verið stór.

Tað er upp til ein sjálvan, um ein velur at senda brævið sum teldupost ella í brævbjálva, men hon vísir á, at brævbjálvin er betur. Somuleiðis er tað eisini upp til ein sjálvan, um ein velur tey brøvini, sum Amnesty hevur skrivað ella ein heldur skrivar sítt egna bræv. Men Amnesty heitir á fólk um heldur at senda brøvini í brævbjálva enn í teldupposti.

– Eitt bræv í brævbjálva sæst betur aftur. Tað er staðfest út frá royndunum frá árum frammanundan, og harafturat kemur tað ofta fyri, at teldubústaðir eru læstir, og tí fær avsendarin teldupostin aftur í høvdið og heldur, at hann hevur fingið skeivan bústað frá okkum, greiðir hon frá.

### Tað ger mun

Einaferð tá Annika var og ferðaðist við familju síni, hitti hon ein leyslatnan samvitskufanga. Hon gekk á einum torgi, har bæði eitt og annað varð selt. Men so fangaði nakað ávíst eygað hjá henni. Tað vóru nakrar myndir, sum á onkran hátt mintu hana á Amnesty. Hon sigur, at tað vóru myndir av fólki handan rimar, av brotnum byrsum og líknandi. Hon keypti onkran prýðislut til dóttur sína. Tá hon kom til mannin, sum seldi, segði hon við hann, at hon helt, at myndirnar vóru hugtakandi og mintu hana um Amnesty. Hann spurdi hana, hvør hon var, og hvaðani hon kom.

Annika greiddi so frá, og hon gekk út frá, at hesin sum so at siga øll onnur, ikki visti nakað um Føroyar. Men har fór hon skeiv. Tað vísti seg nevniliga, at hesin var ein leyslatin samvitskufangi, sum Amnesty hevði arbeitt fyri gjøgnum Skriva fyri Lívið samtakið fyri nøkrum árum síðani. Hann greiddi frá, at brádliga ein dagin byrjaðu brøv at rapla inn til hansara og tað fyrsta, sum hann fekk, kom úr Føroyum.

Annika sigur, at tað var eitt fantastiskt upplivilsi at kunna hitta ein, sum hevði verið úti fyri slíkum. Og undrunarvert er tað, at hon, sum forkvinna í Amnesty í Føroyum, skuldi hitta ein leyslatnan samvitskufanga, sum júst hevði fingið brøv úr Føroyum, í einum hurlivasa av ferðafólkum.

– Hann var so fegin og takksamur, og hann bað meg heilsa øllum í Føroyum og takka fyri hjálpina, sigur Annika Sølvará, sum við hesum vísir á, at tað veruliga ger mun, um fólk taka fimm minuttir um mánaðin til at skriva eitt tílíkt bræv.

– Tað er jú um allan heimin, so alt í alt verða brøvini mong í tali, sigur hon.

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

GERIÐ KVETTI!
Jóla-innkeyp í Hetlandi

Kom við Norrönu til Hetlands, har góðir møguleikar eru at keypa inn til jóla fyri sera sámiligar prísir. Vel ímillum fráferð mánadag ella hósdag við ávikavist einari ella tveimum hotelgistingum.

Mánadag til hósdag úr kr. 1.000,-
**Íroknað prísin** er ferðin fram og aftur við Norrönu og uppihald 1 nátt í dupultkamari á hotelli í Lerwick, íroknað morgunmat.

Hósdag til mánadag úr kr. 1.500,-
**Íroknað prísin** er ferðin fram og aftur við Norrönu og uppihald 2 nætur í dupultkamari á hotelli í Lerwick, íroknað morgunmat.

Kvøldið kanst tú nýta til at síggja nakað av tí, Lerwick hevur at bjóða sínum vitjandi, eitt nú trongar gamlar steingøtur við hugnaligum matstovum, krambúðum, vertshúsum og eitt kaiøki við nógvum virksemi. Í Lerwick eru eisini støð og bygningar av søguligum og mentanarligum virði, sum *Clickimin Broch*, *Fort Charlotte*, *Bod of Gremista* o.m.a.

Í november og desember verður – fyri tey sum búgva á Shetland- og Lerwick Hotel – givin eyka avsláttur í ávísum handlum í Lerwick.

SMYRIL LINE





# Fyrsti arbeiðsdagur



*Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett at umrøða ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, hevði sín fyrsta fund í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett at umrøða hvussu ósemjur á arbeiðsmarknaðinum skulu loysast, hevði sín fyrsta arbeiðsdag í gjár. Áður hevur gingið illa í hond við líknandi arbeiðsbólkum, men Bjarni Djurholm er kortini bjartskygdur**

FYRSTI FUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Arbeiðsbólkurin, ið Bjarni Djurholm hevur settur til at finna eina semju um, hvussu trætur á arbeiðsmarknaðinum skulu loysast, hevði fyrsta fundin í gjár. Arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafeløgini hava fingið trý umboð í part í bólkin. Formaður er Kári á Rógvi, løgfrøðingur.

Líknandi nevndir hava áður arbeitt við sama málið, men aldrin er rokkið á mál. Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, er kortini bjartskygdur.

– Eg havi varhugan av, at partarnir hava sett sær fyri at gera tað, ið gerast kann fyri at fá eina semju. Hesaferð er heldur eingin politisk innblandan, so arbeiðið átti at verið lættari, sigur Bjarni Djurholm.

Arbeiðsbólkurin hevur stutt skotbráð, tí freistin er sett til 31.januar 2004. Bjarni Djurholm vísir á, at ynskja partarnir meira tíð, so ber væl til at leingja freistina.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

**Skeið í Microsoft Certificering**

Í samstarv við **Microsoft Technical Education Center** í Danmark, fara vit at bjóða tvey Microsoft Certificeringsskeið á KVASIR fyrst í desember.

**Updating Systems Administrator Skills from Microsoft Windows 2000 to Windows Server 2003**
2 x kl. 08:30-15:30: 01/12 + 02/12

**Updating Systems Engineer Skills from Microsoft Windows 2000 to Windows Server 2003**
3 x kl. 08:30-15:30: 03/12 + 04/12 + 05/12

Tel 320 204
www.kvasir.fo

# Høgni og Anfinn til Noregs

**Løgmaður, Anfinn Kalllsberg og varaløgmaður, Høgni Hoydal skulu luttaka á pallborðsfundi í Oslo. Evnið á fundinum er útnorður**

PALLBORÐSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Sunnudagin verður pallborðsfundur um samstarv í útnorði. Grønland, Føroyar og Ísland hava seinastu mongu árini samstarvað nógv á serliga fiskivinnuøkinum. Tey síðstu árini er samstarvið farið at fevna um fleiri økir, enn bert fiskivinnan.

Tey trý londini hava nógv í felag. Hvørki Grønland, Føroyar ella Ísland eru við í ES. Londini hava eisini í hvør sínum lagi bart fyri teirra norðurlendska samleika.

Londini í útnorði hava gjørt av, at ein ráðstevna fyri londini í útnorði skal verða øðrum hvørjum ári. Í summar var ráðstevnan í Hetlandi, og í 2005 stendur Noreg fyri tørni.

Á pallborðsfundinum sunnudagin fáa tey vitjandi møguleika at hoyra, hvat útnorðurspolitikkarar halda um møguleikarnar fyri tættari samstarvið í útnorði í framtíðini.

# Ræsting

Í samband við grein um innbrotið á Føroya Bjór í blaðnum í gjár hava vit gjørt Vaktargarðinum órætt. Vit skrivaðu, at Vaktargarðinum var skjótur á staðið, og royndi at fanga innbrotstjóvarnar. Hetta er ikki heilt rætt, tí tað var Ansni og ikki Vaktargarðurin, ið kom á staðið og ikki Vaktargarðurin. So skuldi tað verið sligið fast.

**blðm**

Miðnáttar Blues

Og nú er myrkt og kalt og vátakavi og depressivt og kundi verið:
Eitt-so-typiskt-feeling-low-útlit-til-eitt-áh-so-stereotypiskt-fríggjakvøld-í-Havn!
**MEN SO VERÐUR IKKI Á HESUM SINNI - Nú skal b-l-ú-s-a-s-t við Restorffs**

**Fríggjakvøldið Kl 23.00** fer
Mr. GUDMUNDUR PETURSSON,
fremsti og besti Íslendski blues og jazz guitaristurin
á altjóða støði, at spæla saman við okkara egnu
HEADACHE BLUES TREO BAND

Sosialurin 341800

Leggið vikuna afturum, komið á Vertshúsið,
stemplið Restorffs inn í systemið og latið
so Gudmund, Edward, Una og Rógva
bera tykkum innar í bláu, blues náttina
hagar ikki vendist aftur.

VERTSHÚSIÐ
hjá Restorffs · tel 31 48 48

HAR EIN FER FYRI AT VERÐA SÆDDUR





